

MYND: JENS KRISTIAN VANG

*Soleiðis vil nýggi formaðurin í Javnaðarflokkinum helst avmyndast: Frammanfyri standmyndini uttan fyri Listasavnið. Aksel V. Johannesen vil arbeiða fyri góðum umstøðum hjá barnafamiljum, og hann heldur eisini, at politikararnir mugu gera nakað við fráflytingina – serliga av ungum kvinnum*

## FLOKS-FORMENN Í JAVNAÐAR-FLOKKINUM

M.S. Viðstein 1926-1936
P.M. Dam 1936-1968
Einar Waag 1968-1969
J.Fr. Øregaard 1969-1972
Atli P. Dam 1972-1993
Marita Petersen 1993-1996
Jóannes Eidesgaard 1996- 2011
Aksel V. Johannesen 2011-

skulu vit býta byrðarnar betri. Tá ið fólk tosa um vælferðarskipanir, hugsa tey mest um, hvat tey kunnu fáa burturúr. Rákið í vesturheiminum er, at tað mesta snýr seg um einstaklingurin. Men fyri at fáa rættindi, mást tú eisini hava skyldur. Forteytin fyri framtíðarinnar vælferð er eisini búskaparvøkstur, og tí má Javnaðarflokkurin eisini leggja nógv meira dent á ein skipaðan vinnupolitikk, ikki minst á fiskivinnuøkinum.

### Størri dent á fíggjar- og vinnumál

Í fráfaringarrøðu síni á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum segði Jóannes Eidesgaard, at nú teir borgarligu hava tikið tann sosiala profilin hjá Javnaðarflokkinum til sín, noyðist Javnaðarflokkurin eisini at markera seg á øðrum økjum. Hann nevndi fíggjarpolitikkin og vinnupolitikkin sum dømi.

### Verður tað eisini kósin hjá Aksel Johannesen?

– Ja. Skulu vit hava eitt ríkt vælferðarsamfelag, er eisini avgerandi, at tað kemur nógv inn. Búskaparvøkstur er fortreytin fyri einum góðum vælferðarsamfelag. Søguliga hevur Javnaðarflokkurin næstan ongantíð umsitið vinnu- og fiskivinnumál og øgiliga sjáldan fíggjarmál. Eg haldi, at Javnaðarflokkurin eigur at leggja seg eftir hesum málum í framtíðini. Ikki tí at vit skulu gloyma alt hitt. Men hesi málsøkini eru fortreytin fyri øllum øðrum.

### Og hvat skal málið vera við fíggjar- og vinnupolitikkinum?

– Vit skulu hava samhaldsfesti inn í inngjaldsskipanina. Øll skulu vera við til at fíggja vælferðarsamfelagið eftir førimuni. Og vit skulu halda aftur í góðum tíðum, so at vit klára at standa ímóti í ringum tíðum. Tí áttu vit av røttum ikki at gjørt so stórar sparingar, sum vit gera í dag. Men fortreytin fyri, at tú kanst gera tað er, at tú í góðum tíðum hevur dugað at hildið aftur.

Í vinnupolitikkinum skulu politikararnir halda seg frá at regulera vinnuna niður í smálutir. Tildømis setur fiskivinnulóggávan vinnuni øgiliga nógvar forðingar. Hetta skal broytast og flotin skal gerast minni stirvin. Vit skulu hava ein fiskidagabanka, har tú rindar fyri at gangnnýta tilfeingið. Vinnan skal kunna laga seg til broyttar umstøður. Eins og alivinnan skal fiskivinnan gerast lívfrøðiliga og fíggjarliga haldfør. Skipanin má ikki forða fyri umleggingum og teir yvirskipaðu karmarnir skulu eggja vinnununi til at gagnnýta og virðisøkja tilfeingið á besta hátt. Skapa vit teir røttu karmarnar um fiskivinnuna, kunnu vit skapa ein nógv størri búskaparvøkstur enn vit hava í dag. Og fáa vit tann vøksturin, so sleppa vit undan at spara okkum burturúr hallinum á fíggjarlógini.

> *Flokkinum tørvar ætlanir, sum eru meira ítøkiligar enn tær hava verið*

### Javnaðarfólk skilja

**Nú sigur tú, at Javnaðarflokkurin skal markera seg meira í fíggjar- og vinnumálum, sum teir borgarligu flokkarnir higartil hava sitið tungt á. Men tú sigur eisini, at flokkurin skal halda fast um klassiskan sosialdemokratiskan politikk, við tøttum samstarvi við fakfeløgini, og at hann skal fara til vinstru. Er tað ikki ein andsøgn í hesum?**

– Nei, tað haldi eg ikki. Skal Javnaðarflokkurin tryggja vælferðina hjá tí einstaka, so má flokkurin hava eitt boð upp á hvussu tú loysir allar trupulleikar í samfelagnum, og tað merkir eisini vinnu-, fíggjar- og búskaparpolitikk. Skalt tú hava eitt vælvirkandi almanna-, heilsu- og skúlaverk, so mást tú hava ein skilagóðan vinnupolitikk og fíggjarpolitikk.

Tað tænir eisini arbeiðaranum, at vit hava ein skilagóðan vinnupolitikk. 300 fólk mistu arbeiðið, tá Kósin fór á heysin og 700, tá Fiskavirking fór. Hví hendi tað. Var tað bara óhepni. Ella var tað tí, at vinnan búleikast undir skeivum kørmum at hon ikki fær tað at bera til. Nakað, sum síðani elvir til húsagangir og arbeiðsloysi? Tað ynskir Javnaðarflokkurin ikki skal henda.

Samfelagið hongur saman og tí mugu vit hava boð upp á øll økir. Tað merkir tó ikki, at vit skulu taka hesi málini framum t.d. heilsu-, almanna-, skúla -, og útbúgvingarpolitikkin. Men vinnu- og fíggjarpolitikkurin hevur stóran týdning, tí hann er fortreytin fyri vælferðartænastunum.

### Kann vandi ikki vera fyri, at ein sosialdemokratiskur flokkur missa sínar gomlu kjarnuveljarar – arbeiðararnar og tey veikastu – av í svinginum, tá ið hann skal loysa tey stóru samfelagsmálini?

– Tað ivist eg í. Javnaðarfólk flest vita, at eitt vælvirkandi samfelag kostar pengar. Tí er tað so týdningarmikið, at Javnaðarflokkurin hevur eitt greitt boð upp á fíggjar- og vinnupolitikkin. Hava vit einki boð, so merkja allir føroyingar avleiðingarnar, eisini arbeiðarin. Endamálið við at reka vinnulívspolitikk er ikki at gagna vinnulívsfólkunum, men fyrst og fremst at gagna landskassanum. Ábyrgdarfullur og skilagóður vinnulívs- og fíggjarpolitikkur er fortreytin fyri at vit kunnu hava vælferðartænastur á høgum støði.

### Samgongumøguleikar

Í síni stuttu formanstíð hevur Aksel Johannesen sligið fast, at Javnaðarflokkurin er ein samríkjaflokkur. Hann hevur eisini sagt, at tey ríkastu mugu gjalda meira til vælferðarsamfelagið og at tørvur er á nýskipanum í fiskivinnuni. Hann hevur eisini sagt, at Javnaðarflokkurin skal ikki sita við valdið fyri einhvønn prís.

### Hvørji mál heldur tú, at ein komandi samgonga fyrst og fremst skal skipast um?

– Fyri tað fyrsta kemur tað ikki upp á tal at skerja ríkisveitingina í valskeiðnum 2012-2016 , tí sum støðan er nú, fer tað púra vist at ganga út yvir vælferðina hjá tí einstaka. Harnæst er tað umráðandi, at vit tillaga bæði vinnubygnaðin og almenna bygnaðin. Tað merkir ikki, at vit knívskorið skulu krevja, at hallið verður burtur í 2015. Men vit mugu laga vinnubygnaðin til, so at vit kunnu tryggja ein rímiligan búskaparvøkstur. Eisini mugu vit gevast at nýta plenuklipparan í fíggjarpolitikkinum, soleiðis sum hendan samgongan í stóran mun hevur gjørt. Vit mugu eisini finna út av hvussu vit skipa tann almenna sektorin skilabetri og bíligari, uttan at hetta gongur út yvir vælferðartænasturnar. Tað er tann stóra avbjóðingin.

### Hvørjum flokkum kann Javnaðarflokkurin so best røkka hesum málum saman við?

– Tað er eingin ivi um, at Javnaðarflokkurin og Tjóðveldi kundu funnið semju um at ríkið ein skilagóðan politikk á nógvum økjum. Men fortreytin er, at ríkisveitingin ikki verður skerd. Sjálvt um Sambandsflokkurin er ein borgarligur flokkur, so haldi eg eisini at vit kunnu finna skilagóðar semjur á nógvum økjum við Sambandsflokkin. Og teimum smáu flokkunum plaga vit ikki at hava trupuleikar at samstarva við á nógvum økjum. Men um Fólkaflokkurin ikki vil nakrar broytingar í vinnupolitikkinum og um teirra einasta loysn á búskaparstøðuni er, at vit bara skulu brúka plenuklipparan og niðurlaga alt alment virksemi, so verður tað øgiliga trupult at samstarva við Fólkaflokkin eftir eitt komandi val.

### Men Javnaðarflokkurin skal ikki í samgongu fyri einhvønn prís, hevur tú eisini sagt?

– Vit fara ikki í eina samgongu, har Tjóðveldi t.d. krevur ein niðurskurð í blokkinum. Tað er ikki ráðiligt, sum støðan er í dag. Eisini verður tað trupult at halda fram í einum nýggjari ABC-samgongu, um Javnaðarflokkurin ikki fær undirtøku fyri eini nýskipan av vinnubygnaðinum, sum tryggjar vøkstur og fyri skilagóðum rationalisteringum í almenna bygnaðinum, sum ikki skaða vælferðartænasturnar.